# Nýggjar vørur hvørja viku í Kato




**Kato í Fuglafirði er væl kendur handil, ið hevur mong ár á baki, men handilin hevur tað nýggjasta og fylgir væl við mótarákinum**

Tað er Kaja Toftegaard, ið eigur handilin Kato; harav navnið.
Handilin selur mótavøur. Talan er um klæði til kvinnur, og nevnast kunnu merkini Vero Moda, Only og Pieces.

## Mong ár á baki

Kato hevur mong á baki. Tann 3. mai í ár fylti handilin 31 ár.
Men elli merkist ikki, og Kato er avgjørt við í fremstu røð, tá tað snýr seg um at fylgja við mótanum.
Nýggj vøra kemur hvørja viku, og regluliga verður vitjað á messu í Danmark.
Í Kato kann ein altíð vænta sær at finna okkurt smart, og kvinnur í øllum aldursbólkum leita sær til handils í Kato.

## Úr øllum Føroyum

Fólk koma úr øllum Føroyum fyri at vita, hvat Kato hevur at bjóða. Handilin er væl kendur, og lýsir eisini javnan.
Kaja Toftegaard metir, at sum heild hevur handilslívið í Fuglafirði tað gott, og hóast eitt sindur avsíðis, so leita fólk úr øllum landinum sær til Fuglafjarðar, og á Varmakeldustevnuni t.d. var heilt nógv at gera.
- Vit hava nógv gott at bjóða, og at vøra kemur hvørja viku, og at vit eru á messu regluliga, og annars hava gott samband við seljarar hjá Vero Moda og øðrum, ger, at tað er gott vøruúrval, ið vit bjóða kundunum, sigur Kaja Toftegaard.

## E-kort

Kato er við í E-kort samstarvinum, og kann tí bjóða kundum sínum fyrimunirnar, sum hetta gevur.

---

# Shop-Inn 15 ár á baki



**Ein av kendu klædnahandlunum í landinum er Shop-Inn**

Shop-Inn á Glyvrum er av kendastu klædnahandlum í landinum. Móðir og dóttir reka handilin, sum hevur 15 ár á baki.
Talan er um konufólkaklæði, og úrvalið er breitt.
Heilt ungar gentur og kvinnur finna klæðir í Shop-Inn, eins og tilkomnar kvinnur eisini finna tað, ið teimum hóvar og hava tørv á.
Shop-Inn hevur eisini merkivørur til búnu kvinnuna, men nevnast kunnu eisini mótamerkir sum Vero Moda, Only og Sisters Point.

## Alla staðni frá

Skálafjørðurin hevur ríkt handilslív, og hetta merkist eisini í Shop-Inn, tí fólk koma úr øllum landinum at vita, hvat handilin hevur at bjóða.
Úr Havn koma nógv fólk at vitja Shop-Inn, og um handlarnar á Skálafjørðinum siga tey, at vøruúrvalið er gott og breitt, og øðrvísi enn tað, ið sæst í Havn. Shop-Inn er ein av handlunum í Eysturoynni, ið gongur á odda.
Vørurnar í Shop-Inn eru eisini í ymsum prísflokkum.
Ein avgjørdur fyrimunur er, at handilin við teimum 15 árunum á baki, langt síðani hevur staðfest sína støðu í oddinum, og fólk kring alt landið kenna handilin.

## E-kort

Shop-INN er partur av e-kort samstarvinum, og fáa kundarnir sostatt lut í teimum fyrimunum, sum hetta gevur.












